HB á 100 ára degnum:

# Vinningar fyri 1.000.000 kr.

**Leygardagin fara HB-stuðlar undir stórsligna lutaseðlasølu. Vinningarnir verða drignir í oktober mánaði, og høvuðsvinningurin er ikki minni enn ein íbúð í Berjabrekku**

LUTASEÐLAR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Formaðurin í HB-stuðlum, Sólbjørn Thomsen, ber als ongan ótta fyri, at stuðlarnir skulu brenna inni við einum halli av stóru lutaseðlasøluni*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað er helst sagt fleiri ferðir áður, men í HB ætla tey sær ikki, at tað skal fara ósvarað framvið, nú felagið verður 100 ár.

Føðingardagsfløgan er longu komin á marknaðin, og leygardagin fara HB-stuðlarnir so undir sítt stóra átak, og tað er ikki við mýkindum.

Við áskriftini »vinningar fyri 1.000.000« hava stuðlarnir prentað ikki færri enn 20.000 lutaseðlar, og komandi hálva árið verður so roynt at selja allar hesar.

Ein millión eru sjálvandi nógvir pengar, og tá so høvuðsvinningurin á seðlinum eigur so nógv tann størsta partin av puljuni, so verður tað ikki minni spennandi.

### Íbúð í Berjabrekku

Talan er nevnliga um eina íbúð í Berjabrekku 3, sum skal lutast burtur. Talan er um smærru íbúðirnar, sum liggja í veghædd og eru 63 fermetrar til støddar. Virði av hesari er 950.000 kr., og soleiðis sum eftirspurningurin eftir bæði íbúðum og grundøkjum er í høvuðsstaðnum, so bera tey í HB-stuðlum als ongan ótta fyri, at tað fer at standa á at selja seðlarar.

– Tað óttast vit so als ikki. Sjálvt um tað kanska kann tykjast eitt sindur ógvusligt, at ein lutaseðil kostar 100 kr., so ivist eg ikki í, at tað verða heilt nógv, sum fara at keypa sær ein ella kanska tveir seðlar hvønn mánað.

Soleiðis sigur Sólbjørn Thomsen, formaður í HB-stuðlum, og hann tykist kanska meira enn nakað lættur, nú tey loksins kunnu fara undir søluna av lutaseðlunum.

– Tað er altíð eitt stórt arbeiði, sum skal gerast, tá slíkt skal fyrireikast. Og við somikið stórum vinningum, hava fyrireikingarnar sjálvsagt ikki verið minni, sigur hann.

Og so kundi kanska verið skoytt afturat, at enn er stríðið so ikki liðugt. Hóast Byggiharrin í Berjabrekku, Høgni Mikkelsen, er svorin HB-viðhaldsmaður, so røkkur hetta ikki somikið langt, sum til at geva felagnum eina ókeypis íbúð at luta burtur.

Við øðrum orðum vil tað siga, at fyrstu 10.000 seðlarnir ella har á leið fara til at gjalda høvuðsvinningin, so tað hvílir framvegis ein stór ábyrgd á teimum, sum skulu selja seðlarnar.

### Drigið á føðingardegnum

Leygarmorgunin fara HB-stuðlarnir undir søluna av seðlunum, og verður tað á Torginum í SMS, at hetta verður skotið ígongd.

Vanliga kunnu sølur av lutaseðlum strekkja seg yvir átta vikur, men HB hevur so fingið loyvi at selja í hálvt ár, og í sambandi við sjálvan føðingardagin verður so drigið millum mongu seðlarnar, soleiðis at hepni vinnarin kann finnast.

100 ára dagurin er 17. oktober, og 22. oktober verður vinnarin so funnin. Um hesin so eisini fer at verða við á stóru gallaveitsluni hjá felagnum, sum verður dagin eftir, er ilt at siga, men kanska hevur vinnarin als ikki stundir til nakra veitslu tá. Talan er nevnliga um lyklaklára íbúð, so um innbúgv við meira er keypt, so hevur vinnarin helst úr at gera við flytingini til ta tíð.

# Útlendingamálið spøkir enn

Í farnu viku frættist, at landsstýrismaðurin í innlendismálum hevur sent eitt uppskot um seravtalu fyri ítróttarfólk til danska útlendingastýrið.

Málið snýr seg sjálvsagt um, hvørt útlendsk ítróttarfólk skulu hava sersømdir at koma inn til Føroya, og líkt er til, at Ítróttarsambandið og Landsstýrismaðurin framvegis standa langt frá hvørjum øðrum hesum viðvíkjandi.

Í øllum førum hevur Jógvan við Keldu í sínum uppskoti mælt til, at skulu útlendsku ítróttarfólkini hava uppihalds- og arbeiðsloyvi, skulu feløgini rinda teimum eina samsýning, sum í minsta lagi er 2.300 kr. um vikuna.

Í skrivi til løgmann hevur ÍSF mótmælt hesum.

ÍSF sigur í skrivinum, at tey eftir førimuni hava roynt at gjørt vart við vandamálini, sum hetta hevur við sær, men at hetta enn tykist hava verið til fánýtis.

– Avtalan, sum nú liggur á borðinum, er ónýtilig. Ítróttasamband Føroya vil harðliga mótmæla, at ítróttурin ikki verður hoyrdur, tá slíkar, fyri okkum, týðandi avtalur verða gjørdar, verður at enda staðfest í tíðindaskrivinum.

**-jm**

# Spæla longu mikudagin á Skála

**Dysturin í fyrsta umfarinum er framskundaður, tí HB annað vikuskifti í Gundadali skal spæla í Atlantic Cup ímóti KR úr Reykjavík**

LANDSKAPPINGIN
*Jóannes Hansen*

Tá ið fyrsta umfarið í landskappingini verður á skránni sunnudagin 25. apríl ella Flaggdagin, verða tað bara átta av teimum tíggju liðunum í bestu deildini, sum fara at spæla um stig.

FSF boðar frá, at dysturin á Skála, har HB sambært skipanini skal vitja í fyrsta umfarinum, er framskundaður. Í staðin fyri Flaggdagin verður dysturin spældur mikudagin 21. apríl. Eftir at Skála fram ímóti dystarenda var á odda 2–1 og síðani tapti 3–2 í steypadystinum í Gundadali fyri stuttum verður hesin fyrsti landskappingardysturin av øllum ivaleyst mettur at verða uppaftur meiri spennandi, enn hann frammanundan varð mettur at vera.

Orsøkin, at dysturin millum Skála og HB er framskundaður, er tann, at HB annað vikuskifti skal spæla í Atlantic Cup. Talan er um samstarvið millum føroyskan og íslendskan fótbólt, sum Atlantsflog stuðlar. Tað snýr seg um, at føroysku meistararnir og íslendsku meistararnir hittast síðsta vikuskiftið í apríl. Aðru hvørja ferð verður spælt í Føroyum, og aðru hvørja ferð verður spælt í Íslandi. HB og KR úr Reykjavík hittust í fjør, og tey hittast aftur í ár. Í fjør spældu tey í Reykjavík, og hesa ferð verður spælt í Gundadali. Dysturin er ásettur at vera leygardagin 24. apríl.

### Útseta ein tíma

FSF hevur eisini boðað fótbóltsfeløgunum frá, at dystirnir í fyrsta umfarinum ikki skulu spælast klokkan trý seinnapartin, tá ið tað annars plagar at verða spælt. Tað verður skipað fyri flaggdagshaldum kring landið. Tí hevur FSF gjørt av, at landskappingardystirnir henda dagin skulu spælast klokkan fýra. Harvið fer tað at bera til hjá áskoðarunum fyrst at fara til flaggdagshald og síðani til fótbólt.

Við avgerðina at flyta dystarbyrjanirnar hevur FSF víst, at Fótbóltssambandið virðir flaggdagshaldini.

Teir fýra dystirnir, sum verða á skránni Flaggdagin, eru hesir: KÍ-B68, GÍ-ÍF, NSÍ-VB og B36-EB/-Streymur.

Suni Johansen skal døma á Skála, Dagfinn Olsen í Klaksvík, Petur Skarðenni í Gøtu, Lassin Isaksen skal døma í Runavík, og ímillum B36 og EB/Streym verður Páll Augustinussen dómari. Í Atlantic Cup leygardagin 24. apríl í Gundadali verður Niklas á Líðarenda 23. maðurin á vøllinum, tá ið HB og KR fara at takast.




# Nýtt Føroyskt Tógv

Tógvið er at fáa í hesum handlum kring landið:

NORÐOYGGJAR
Norðoya Heimavirki
Hjá Vimu
Búnin
Handilin
Brúgvaskifti

EYSTUROY
Josi
Inn
Toystovan
Karl Hansen
Eysturoyar Heimavirki
Navia

VÁGAR
Valdemar A. Simonsen
Kristianshús
Prýði

STREYMOY
Seymibúðin Eldina
Kjalnesbúðin
Hjá Palla
Fandango
Igloo
Vima
Bindibúðin
Hans Iversen
Gabriel

SANDOY
Búrhandilin
Ellubitin
Handilin

SUÐUROY
N. P. Nónstein
Tøbúðin
Zacharias Müller
Suðuroyar Heimavirki



*Vaskað í nuðum og óvaskað á spola í 6 ymiskum náttúrlitum í 2 tráðaðum fínum, 2 tráðaðum og 3 tráðaðum*



MYNSTURKAPPING

Bindibúðin í SMS og Navia útskriva mynsturkapping.

Í samband við, at nýggja føroyska Navia-tógvið kemur á marknaðin, er ætlanin at geva út eina bindibók. Mynstrini verða útvald frá teimum pløggum, sum koma inn til kappingina.

**Krøv til luttakarar í mynsturkappingini**
- Mynstrini skulu vera nýskapandi og úr tógvi frá Navia
- Mynstrini kunnu bæði verða til børn og vaksin
- Rættindini uppá mynstrini verða latin Navia og Bindibúðini.
- Luttakararnir skulu eisini í stuttum lýsa hvussu plaggi varð bundið, og hvussu nógv tógv fór í plaggi.

**Vinningar**
Høvuðsvinningur 5.000 kr.

Eisini verða vinningar latnir øllum sniðgevarum, sum verða við í bindibókini.

Innlatingarfreistin er friggjadagin 25. juni. Latast inn til Bindibúðina í SMS ella Navia á Toftum.

Um tygum hava spurningar viðvíkjandi hesum, setið tygum í samband við Navia ella Bindibúðina.

navia

Postsmoga 42 FO-650 Toftir Føroyar
Tel. 449282 Fartel. 219482 Fax 449281
navia@navia.fo





NORÐURLANDAHÚSIÐ **TILTØK APRÍL 2004**

**SKRÁIN VIKA 17–18**

**Listaframsýning við grafiskari list hjá Åse Bømler (FO) er í húsinum til 18. apríl**
**Listaframsýning hjá listamanninum Lennart Iverus (SE) er í húsinum til 18. apríl**
**Framsýningin "Veiðimentan" er á Etnografisk Museum í Stockholm**

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Hósdagur** | **22. apríl** | **Kl. 09.00** | KT-messa. Fyriskipari er Virkisráðgeving |
| **Friggjadagur** | **23. apríl** | **Kl. 09.00** | KT-messa. |
| **Leygardagur** | **25. apríl** | **Kl. 14.00-18.00** | Flaggdagur. Opið sum sunnudag |

Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-18.00 og sunnudagar kl. 14.00-18.00

NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM
Telefon nr. 317900 · Telefax nr. 315790
www.nlh.fo · e-mail: nlh@nlh.fo



Lesið Sosialin



NEISTIN

**Neistin**

Eykaaðalfundur verður týsdagin 27/4 kl. 19.00
í hølum felagsins í Gundadalshøllini.

**Nevndin**


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 620, Sp/f Tannlæknastovan í Hvalvík, 430 Hvalvík.

**Viðtøkur broyttar:** 11.02.2004
**Nýtt navn:** P/F Tannlæknastovan í Hvalvík
**Kapitalur:** Hækking við kr. 720.000,00 til kr. 800.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 720.000,00 við grunshækking.
**Nevnd:**
**Innkomin í nevndina:** Poulina Jóannesardóttir, Grønalág 1, 100 Tórshavn (formaður), Hans Jørgen Jensen, 430 Hvalvík og Steen Juul Petersen, Sandágøta 3, 160 Argir.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið av stjóranum ella av allari nevndini í felag.
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka tannlæknavirksemi og annað virksemi í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 14. apríl 2004*
*Kristin Balle*


# Ætlar tú at leggja av at roykja?

***Nú hevur tú møguleikan at verða við á einum skeiði fyri bólkar, har tú leggur av at roykja.***

Roykisteðg-skeiðið verður fyriskipað av royki-avvenjarum á Tjaldurs Apotek og er skipað soleiðis:

Í hvørjum bólki verða uml. 8-10 luttakarar. Vit møtast 5 mánakvøld yvir uml. 6 vikur og hvør kvøldfundur er uml. 2 tímar.

Byrjað verður mánakvøldið 19. apríl og endað verður mánakvøldið 24. mai. Miðskeiðis í skeiðnum verður dagurin ásettur, sum tú skalt leggja av at roykja!

Kostnaður fyri skeiðið er 1000,- kr. og tilmelding fer fram á Tjaldurs Apotek.

Hevur tú fyrispurning hesum viðvíkjandi, kanst tú ringja á Tjaldurs Apotek og spyrja eftir einum roykiavvenjara.

TJALDURS APOTEKIÐ
**R.C.Effersøesgøta 31**
**Tórshavn**
**Tlf. 341100**